gult cyan magenta svart

LØGMAÐUR:

Kaotiskt um fólkaatkvøðan kemur í tingið

- Tað hevði verið brot á alla vanliga mannagongd, og tað vildi verið sera óklókt av Tjóðveldisflokkinum at farið í tingð við uppskotinum um fólkaatkvøðu, sigur løgmaður.

LONDON, TÝSKVØLD KL 23:50:
Jan Müller

- Eg haldi ikki, at politiska støðan er broytt, síðani eg fór úr Tinganesi fríggjakvøldið, burtursæð frá tí, at nógv er sagt og skrivað síðani.

Hetta sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum er staddur í London, við Sosialin í kvøld. Hann vísir á, at tað einasta, sum skilir landsstýrisflokkarnar er, at teir eru ósamdir um fólkaatkvøðuna.

Men hesum eru samstarvsflokkar hansara, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin ikki heilt samdir við honum í.

Við útvarpið í fyrr í dag segði Høgni Hoydal, at naggatódn er í politisku støðuni. Hann segði, at Tjóðveldisflokkurin vil halda gjørdar avtalur, og sipaði hann helst til avtaluna um at skriva út fólkaatkvøðu um fullveldisleistin 26. mai.

Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisflokksins, segði við útvarpið, at tey ikki halda so fast við kravið um fólkaatkvøðuna 26. mai, men at tey eisini kunnu semjast um aðra loysn á málinum.

Men tað verður eingin fólkaatkvøða yvirhøvur. Hetta hevur løgmaður gjørt greitt, og tað leggur hann enn einaferð dent á. Og um Tjóðveldisflokkurin kortini fer í tingið við uppskotinum um fólkaatkvøðu, so biður flokkurin um trupulleikar, sigur løgmaður:

- Eg havi fingið at vita, at Tjóðveldisflokkurin tvíheldur um, at uppskotið um fólkaatkvøðuna skal niðan í tingið. Tað er sera kaotiskt fyri Føroya fólk, um tað hendur, at uppskotið fer niðan í tingið, uttan at man ætlar at gjøgnumføra tað - og tað verður ikki gjøgnumført, tí meirituli er ikki fyri tí, sigur løgmaður.

- Fer Tjóðveldisflokkurin niðan í tingið við einum uppskoti, sum hann veit, ikki kemur ígjøgnum, so biður hann um trupulleikar, og tað er júst tað, sum vit hava roynt at sloppið undan, sigur løgmaður, sum vísir á, at landsstýrið alla tíðina hevur roynt at funnið semju, áðrenn mál hava verið borin niðan í tingið.

- Men verður tað soleiðis, at vit semjast um eitt annað uppskot – ella eitt tillagað uppskot – so ber væl til at leggja tað fyri tingið, hóast tíðarfreistin er farin, sigur Anfinn Kallsberg, sum kortini leggur dent á, at tað verður so ikki eitt uppskot um fólkaatkvøðu.

Sjálvt um tað er púra klárt, at samgongan ikki fer at semjast um at halda fólkaatkvøðu, og at Fólkaflokkurin ikki er at vika í hesum máli, so væntar løgmaður kortini ikki, at Tjóðveldisflokkurin fer at leggja fram uppskotið í sjálvdrátti.

- Tað hevði verið brot á alla vanliga mannagongd, og tað vildi verið sera óklókt at gjørt tað, sigur løgmaður.

Skuldi tað hent, at samgongan skrædnaði, so væntar Anfinn Kallsberg ikki, at vit fara at hava eitt minnilutalandsstýri.

- Vit hava onga traditión við minnilutastjórn, so tað dugi eg ikki at ímynda mær.

Upp á spurningin, um nýval verður útskrivað, svarar løgmaður, at tað loysir als ongar trupulleikar.

Og tá vit spyrja hann, um hugsandi er, at hann fer at bjóða øðrum flokkum við í samgonguna, um hon skrædnar, hevur hann als onga viðmerkingar.

Løgmaður vónar, at hann situr sum løgmaður restina av hesum valskeiði, men hann viðgongur, at hann hevur eitt turbolent bakland, og tí kann hann ikki kenna seg heilt tryggan.

Tey deyvu vilja eisini sleppa uppí part

Nýggja kringvarpslógin eigur eisini at tæna teimum deyvu í Føroyum, so tey kunnu fáa ta kunning, sum er neyðug. Hetta gera áhugafeløgini hjá teimum deyvu vart við í skrivi til løgtingið.

KRINGVARPSLÓGIN
Magnus Dam

Í næstan tíggju ár hava tey deyvu í Føroyum stríðst við myndugleikarnar um at fáa betri sømdir, tá ið tað snýr seg um tíðindaflutning og sendingar fyri deyv. Men líkt er til, at tey hava tosað fyri deyvum oyrum.

Í øllum førum er ikki stórur bati at sígggja, tá ið kagað verður í sjónvarpsskránna. Tíðindi fyri deyv verða send einaferð um vikuna, og annars eru onkrar aðrar sendingar fyri deyv, sum tó fyri tað mesta eru framleiddar í Danmark.

Sum í so nógvum øðrum førum er trupulleikin pengar. Tað kostar at teksta sendingar, at senda sendingar við simultantulki og at framleiða sendingar, ið venda sær til deyv. Hesar pengarnar hevur sjónvarpið ikki.

Men nú ein nýggj kringvarpslóg er løgd fyri løgtingið, royna Deyvafelagið og Foreldrafelagið Hoyrnin at gera vart við síni sjónarmið einaferð enn. Feløgini vilja sleppa á fund við mentanarnevndina hjá løgtinginum, sum viðgerð málið í løtuni, og tey skjóta millum annað upp, at kringvarpslógin verður broytt, so hon tænir teimum hoyribrekaðu betri.

Rættindini skulu lógarfestast

Tey bæði áhugafeløgini skjóta upp fyri mentanarnevndini, at deyv, sum nyta teknmál, fáa lógarfest ta kunning, sum er neyðug, fyri at virka sum borgarar í Føroyum.

Í einari av lógargreinunum skal Sjónvarp Føroya áleggjast at framleiða so nógvar sendingar við simultantulki ella á teknmáli, sum til ber. Málið er, at tey, sum brúka teknmál, fáa ta kunning, sum er neyðug, skriva Deyvafelagið og Foreldrafelagiði Hoyrnin í einum bræví til mentanarnevndina.

Áhugafeløgini vísa eisini mentanarnevndini á nógvu orkuna, sum feløgini hava lagt í at fáa teimum hoyribrekaðu betri sømdir hesi seinastu tíggju árini. Nógvir fundir hava verið milllum landsstýrismenn, umsitingina og Sjónvarp Føroya, og fleiri ferðir hava ítøkiligar ætlanir ligið á borðinum um at bøta um viðurskiftini. Eitt nú hava uppskot verið frammi um at senda tíðindi fyri deyv fleiri ferðir um vikuna og at senda Dag og Viku við simultantulki. Men hvørja ferð hevur avmarkaða fíggjarorkan hjá sjónvarpinum tarnað ætlanunum.

Meira føroyskt

Landsstýrismaðurin í mentanarmálum sigur í lógaruppskotinum, at tað helst verður neyðugt at játta sjónvarpinum nakrar milliónir krónur til at framleiða fleiri føroyskar sendingar og teksta fleiri sendingar til føroyskt. Málið er, at helvtin av sendingunum skulu framleiðast í Føroyum og helvtin av tilfarinum skal sendast við føroyskum teksti.

Skulu sendingar eisini simultantulkast, so mugu politikararnir játta neyðuga peningin, og áhugafeløgini hjá teimum deyvu og hoyribrekaðu fara at gera sítt til, at hetta verður veruleiki. Enn hava feløgini ikki fingið fundarboð frá mentanarnevndini, sum annars viðgjørdi kringvarpslógina á fundi í gjár.

Samgongustríðið herðist

Samgongustríðið, sum tók seg upp á landsstýrisfundinum fríggjadagin, harðnar alsamt. Løgmaður sendi gjáramorgunin Høgna Hoydal fax úr London við greiðum boðum um, at samgongusamstarvið var brotið, um uppskotið um fólkaatkvøðu kom í tingið í gjár

Formligi landsstýrisfundurin fyrrapartin í gjár varð brádliga avlýstur. Orsøkin var eitt bræv, sum løgmaður sendi Høgna Hoydal úr London beint áðrenn fundin. Løgmaður metir samgongusamstarvið vera brotið, um Høgni Hoydal, sum virkandi løgmaður, avgreiðir uppskotini um fólkaatkvøðu

SAMGONGUKREPPA
John Johannessen

Stríðið í samgonguni um leiðina fram móti føroyskum fullveldi harðnar alsamt.

Formligi landsstýrisfundurin, sum Høgni Hoydal, virkandi løgmaður, hevði boðað frá klokkan níggju gjáramorgunin varð brádliga avlýstur, tá allir landsstýrismenninir vóru komnir á fund. Seinni varð fundurin ásettur at byrja á middegi, og uppaftur seinni varð fundurin útsettur til klokkan 13.

Orsøkin til ruðuleikan var eitt bræv, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður, sendi Høgna Hoydal úr London beint fyri fundin.

Í brævinum ger Anfinn Kallsberg greitt fyri Høgna Hoydal, at hann metir tað, sum at samgongusamstarvið er sagt upp, um Høgni Hoydal leggur lógaruppskotið um fólkaatkvøðu fyri tingið, meðan løgmaður er burturstaddur.

Harraboð

Høgni Hoydal staðfesti í fjølmiðlunum týskvøldið, at hann ætlaði sær at halda tær avtalur, sum eru gjørdar í samgonguni. Hetta kann tulkast, sum at Høgni Hoydal hevur ætlað sær at fáa uppskotið í tingið meðan løgmaður er burtur. Høgni Hoydal hevur nevniliga sagt, at avgerðin hjá løgmanni, um at uppskotið ikki skal fyri tingið, er brot á gjørdar avtalur.

Løgmaður segði við Internetsosialin týskvøldið, at hann hevði fingið at vita, at Tjóðveldisflokkurin tvíheldur um, at uppskotið um fólkaatkvøðuna skal í tingið.

– Fer Tjóðveldisflokkurin niðan í tingið við einum uppskoti, sum hann veit, ikki kemur ígjøgnum, so biður hann um trupulleikar, og tað er júst tað, sum vit hava roynt at sloppið undan, segði løgmaður við Internetsosialin.

Hesum boðaði løgmaður Høgna Hoydal frá formliga í brævinum gjáramorgunin, og var tað hetta, ið gjørdi, at landsstýrisfundurin varð útsettur.

Deadline klokkan 16

Klokkan 16 í gjár var seinasta freist í hesi tingsetuni hjá landsstýrinum at leggja lógaruppskot fyri tingið. Tí var ætlaði formligi landsstýrisfundurin í gjár ein ógvuliga týdningarmikil fundur.

Talan var um 28 mál, sum skulu avgreiðast úr landsstýrinum áðrenn klokkan 16. Fýra av hesum uppskotunum átti Høgni Hoydal, og snúu tey seg millum annað um fólkaatkvøðuna.

Tískil var tað ósemjan millum løgmann og Høgna Hoydal, sum forðaði fyri, at hini 24 málini vórðu viðgjørd á landsstýrisfundi fyrrapartin í gjár. Hetta skapti ógvuliga stóra ónøgd millum landsstýrisumboðini hjá Fólkaflokkinum, sum harðliga mótmæltu framferðini hjá Høgna Hoydal.

Tá Sosialurin fór til prentingar á middegi í gjár var enn ikki greitt, um nakar landsstýrisfundur varð hildin. Heldur ikki bar til at fáa fatur á Høgna Hoydal.

Heini O. Heinesen, formaður í tingbólki Tjóðveldisfloksins, sigur tó, at støðan næstan kann metast, sum at løgmaður hevur sagt samgonguna upp.

– Men løgmaður torir ikki sjálvur at boða frá, at samgongan verður søgd upp. Tí brúkar hann Javnaðarflokkin sum jarnbrot, fyri at fáa Tjóðveldisflokkin at siga hana upp, sigur Heini O. Heinesen.

Sosialurin skilir, at ítøkiligt samband framvegis er millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin um politisku støðuna. Løgmaður skuldi í gjárkvøldið flúgva úr London til Keypmannahavnar. Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, er eisini staddur í Keypmannahavn, men vit vita einki um, at teir báðir skulu hittast. Løgmaður flýgur heim til Føroya í morgun.

FISKARØKTARI

Til alibrúk okkara á Gøtuvík søkja vit eftir fiskarøktara.

Sum fiskarøktari fært tú fyrst og fremst ábyrgdina av at fóðra fiskin. Tað vil siga, at síggja til at fiskurin veksur mest møguligt við minst møguligum fóðri.

Hetta merkir, at tað er ein fyrimunur, at tú hevur meira enn vanligan fólkaskúla og hevur ein ávísan talkunnleika.

Tað er týdningarmikið, at tú hevur áhuga fyri at skapa úrslit, hevur áhuga fyri lívfrøði, at tú ert røkin, og at tú dugir at venda tær í einum báti.

Vit bjóða tær eitt áhugavert starv við møguleika fyri menna teg sjálvan við skeiðum í eitt nú teldu, fiskarøkt og øðrum.

Tí rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt gott og vælløn starv.

Meira fæst at vita við at ringja til Jógvan Joensen á tel 211 152 ella Atla Gregersen á tel 333 257.

Umsóknir skulu sendast til: Pf. Luna, Postsbox 29, 510 Gøta.

Umsóknirnar skulu verða inni í seinasta lagi 12. mars. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

LUNA ER EITT STÓRT OG NÝMÓTANS ALIBRÚK, IÐ ALIR LAKS Á GØTUVÍK.

LUNA

P.O. Box 29 · FO-510 Gøtu · Faroe Islands
Tel +298 441002 · Fax +298 441766